## Spania trumar víðari

Sponsku europameistararnir vísa eingi tekin um at seta ferðina. Teir vunnu í gjár sín 10. sigur á rað í undankappingini. Hesa ferð við imponerandi 5-2 útisigri móti Bosnia-Herzegovina. Pique, Silva, Negredo (2) og Mata stóðu fyri málunum, sum skutu Spania upp á 5-0, áðrenn heimaliðið í yvirtíðini minkaði tvær ferðir um munin. Spania vann sær soleiðis fult stigatal fyri teir 10 dystirnar í undankappingini, og eingin ivi er um, at teir teljast millum favorittarnar, tá spælt verður um HM-steypið komandi summar.

© 1977 FIFA TM

## 23 eru nú til reiðar

Fyri hvørt umfar, sum rennur av undankappingini, leggjast fleiri lond aftur at listanum av HM-luttakarum. Hesin lisin skal at enda telja 32 lond, og higartil eru 23 nøvn sett á luttøkulistan. Tey eru Danmark, Sveis, Slovakia, Týskland, Spania, Ongland, Serbia, Italia, Holland, Suðurafrika, Ghana, Fílabeinsstrondin, Australia, Japan, Norðurkorea, Suðurkorea, Brasil, Paraguay, Chile, Argentina, Mexico, USA og Honduras.



Føroyska landsliðið arbeiddi knallhart fyri sensatiónini, og móti dystarenda kom spenningur aftur í dystin, men hesin helt sær tó ikki leingi

innleggið frá Marica liggur perfekt til Bucur, sum trýnur fram um Egil á Bø og stútar í netið.

Tíggju minuttir seinni kundi støðan verði 3-0, men einans ein rætt og slætt ótrúlig bjarging frá nú fyrrverandi landsliðsmálverjanum helt føroyska landsliðnum inni í dystinum.

### Egil við fyrsta málinum

Og inn aftur í dystin komu føroysku leikararnir av álvara sjey minuttir fyri leiklok. Símun Samuelsen gjørdi eitt tað frekasta trekkið, sum er gjørt á føroyska landsliðnum í longri tí, dróg eitt sindur í vinstra borði og varð feldur.

Súni Olsen tók sær av frísparkinum, legði tað perfekt innfyri til Egil á Bø, sum rann seg í sera góða støðu og stútaði bóltin í tóma málið. Hvar málverjin var og hvat hann ætlaði at gera, er ilt at siga, men líka legði liðformaðurin hjá EB/Streymi í, tá hann setti krúllin undir bóltin.

Málið fingu føroyingar meðan teir einans vóru tíggju mans á vøllinum, tí Jákup á Borg var uttanfyri við skaða. B36'arin varð stemplaður rættiliga ófantaliga og kom ongantíð fyri seg aftur, og ein útskifting var ikki møgulig, tá Brian Kerr hevði brúkt allar.

### Bílig mál avgjørdu

Við tíggju monnum móti 11 rumenum var tað ein trupul setningur, ið nú skuldi greiðast, um javnleikur skuldi hálast heim. So langt komu føroyingarnir ongantíð, tí tveir minuttir fyri leiklok staðfesti Rumenia sigurin.

Ein rumeni slapp at seta bæði Egil á Bø og Jónas Þór Næs av, áðrenn hann smekkaði til. Jákup Mikkelsen vardi fyri men slepti ein retur, sum Mazilu lættliga setti í netið.

Enn eitt mál av teimum heldur bíligu, tí Cristea slapp alt ov lætt framvið Egili og Jónasi, og Jákup Mikkelsen átti at hildið skotinum.

Harvið var leyst og liðugt! Føroyar taptu 3-1 fyri einum rumenskum liði, sum á ongan hátt imponeraði og sum avgjørt var til at tosa við.

Harmiligt, tí Føroyar spældu í roynd og veru als ikki so galið. Menn stríddust væl og arbeiddu hart. Tíverri vóru tað ikki allir, ið raktu dagin og harvið gekk tað heila ikki upp í eina hægri eind.

Skulu stig fáast á hesum støðinum, skulu allir spæla optimalt og alt skal sampakka. Tað gjørdi tað ikki í gjárkvøldi, men kortini hingu føroyingar í og fingu eitt mál.

Tað er meira enn so ofta áður og er enn eitt stig á rætta vegnum.

## FAKTA

**Rumenia-Føroyar 3-1 (1-0)**

HM undankappingardystur á Ceahlaul leikvøllinum í Piatra Neamt í Rumenia mikudagin 14. oktober 2009 kl. 21.00.

Dómarakvartett úr Russlandi: Alexander Gvardis, Tikhon Kalugin, Mikhail Erovenko og Maxim Layushkin

**1-0:** Iulian Apostol 16.

**2-0:** Gheorghe Bucur 65.

**2-1:** Egil á Bø 83.

**3-1:** Ionut Mazilu 88.

??? áskoðarar

**Rumenia:** 1. Costel Pantilimon – 2. Cristian Panin, 3. Razvan Rat, 4. Iulian Apostol, 5. Dorin Goian (15. George Galamaz, 26.), 6. Mirel Radoi, 7. Varga Daciam, 8. Bogdan Mara, 9. Ciprian Marica (16. Ionut Mazilu, 82.), 11. Nicolae Grigore, 18. Gheorghe Bucur (17. Andrei Cristea, 76.)

**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 10. Tiberiu Balan, 12. Ciprian Anton Tatatusanu, 13. Mircea Nesu og 14. Adrian Cristea

**Gult kort:** Cristian Panin 45., Nicolae Grigore 53.

**Venjari:** Razvan Lucescu

**Føroyar:** 1. Jákup Mikkelsen, 67/-152, liðformaður, KÍ – 2. Jónas Þór Næs, 11/0, Frem, 5. Egil á Bø, 11/1, EB/Streymur, 4. Atli Gregersen, 6/0, Víkingur, 3. Atli Danielsen, 35/0, KÍ – 11. Christian Lamhauge Holst, 18/2, Silkeborg IF (12. Bogi Løkin 10/1, NSÍ, 69.), 9. Jákup á Borg, 60/2, B36, 10. Súni Olsen, 39/3, Víkingur, 7. Fróði Benjaminsen, 56/3, HB (14. Christian Høgni Jacobsen, 49/2, NSÍ, 82.), 8. Símun Samuelsen, Keflavík, 27/1 – 6. Rógvi Jacobsen, 53/10, ÍF (18. Arnbjørn T. Hansen, 6/1, EB/Streymur, 76.)

**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 13. Bartal Eliasen, 6/0, ÍF, 15. Jann Ingi Petersen, 16/0, NSÍ, 16. Meinhard Joensen, 0/0, NSÍ, 17. Johan Troest Davidsen, 14/0, NSÍ

**Gult kort:** Egil á Bø 30., Jákup á Borg 43., og Símun Samuelsen 50.

**Venjari:** Brian Kerr

# Jákup farin um 60

**B36 miðvallarin Jákup á Borg er fimti føroyski landsliðsspælarin í fótbólti, sum hevur rokkið 60 landsdystum**

Í gjárkvøldið spældi Jákup á Borg á landsliðnum fyri 60. ferð. Hann er fimti føroyski spælarin, sum hevur umboðað føðilandið í fótbólts-landsdysti so mikið ofta.

Óli Johannesen eigur dystarmetið, sum er 82. Jákup Mikkelsen hevur spælt 67 landsdystir, og Julian S. Johnsson hevur spælt 62 ferðir fyri Føroyar.

Tað er møguleiki fyri, at ein og kanska tveir spælarar í 2010 fara at røkka 60 landsdystum. Fróði Benjaminsen spældi í gjárkvøldið fyri 56. ferð á landsliðnum, og Rógvi Jacobsen var á landsliðnum fyri 53. ferð.

### Í nýggjum leikluti

Tá ið tað varð farið undir hetta landsliðsárið, hevði Jákup á Borg umboðað Føroyar 57 ferðir. At tað ikki var fyrrenn nú, at Jákup rakk upp á 60 kemst av, at hann fyrr í ár var skaðaplágaður, og av at hann onkra ferðina var á beinkinum alla tíðina, tí Bogi Løkin røkti ódnina í høgru, sum Jákup oftast hevur verið í.

Eitt skifti var tað mangt, sum bendi á, at Jákup á Borg hevði mist lyklaleiklutin, sum hann leingi hevur havt, men hesar seinastu mánaðirnar hevur hann sum fuglurin Fønix reist seg. Jákup var við í 2-1 heimasigrinum á Letlandi. Tá spældi hann framúr væl í meiri sentralum miðvallar leikluti, og í gjárkvøldið var hann aftur á sentrala miðvøllinum.

Jákup var fyrstu ferð á landsliðnum í 1998. Mikudagin 19. august fyri gott og væl ellivu árum síðani taptu Føroyar 1-0 í Saraevo ímóti Bosnia. Tá ið tað restðu tólv minuttir, varð Jákup á Borg settur á vøllin í staðin fyri Una Arge.

Jákup á Borg hevur skorað tvey mál fyri Føroyar. Myndin av Jákupi á Borg á landsliðnum, sum hjá teimum flestu ivaleyst man standast klárast, er tann frá 6. september 1992, tá ið úrslitið var 2-2 ímóti Skotlandi á heimavølli. Tíðliga í 1. hálvleiki legði Jákup meistarlig innlegg úr høgru – úr norðaru síðu á Svangaskarði – og John Petersen skoraði bæði til 1-0 og 2-0.

**Mørk**



Jákup á Borg spældi sín 60. landsdyst, tá føroyska liðið setti punktum fyri bestu undankappingini í átta ár